**Jørgen Niclasen**
**løgtingsmaður**
**vegna Fólkaflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 29/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)** (Botnfrádráttur í kommunuskattinum)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**
(Botnfrádráttur í kommunuskattinum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 169 frá 20. desember 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Hjúnafelagar verða hvør sær settir sjálvstøðugt í skatt av inntøkum sínum. Um skattskyldug inntøka hjá øðrum hjúnafelaganum er undir skattafría botnfrádráttin í kommunuskattinum og hjá hinum yvir, verður ein javning gjørd, so at tann lægra inntøkan verður hækkað við upp til ásetta skattafría botnfrádráttin hjá kommununi, og tann hægra verður lækkað samsvarandi.”

**2.** Í § 46, stk. 1 verða aftan á 2. pkt. sum nýggj pkt. sett:
“Frá 1. januar 2019 kunnu bygda(r)ráðini gera av at hækka upphæddina í 2. pkt. soleiðis, at eingin kommunuskattur verður álíknaður skattskyldugu inntøkuni upp til 65.000 kr. Upphæddin skal vera samtykt av bygda(r)ráðnum fyri 1. desember, galdandi fyri komandi inntøkuár.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar:**

Við verandi lóggávu kunnu kommunur sjálvar áseta skattaprosent og barnafrádrátt. Endamálið við hesum uppskoti er, at kommunur eisini fáa heimild at hækka botnfrádráttin í kommunuskattinum.

Vanliga hevur botnfrádrátturin í landsskatti og í kommunuskatti verið tann sami. Við flatskattinum varð botnfrádrátturin í landsskattinum hækkaður úr 30.000 kr. heilt upp í 65.000 kr., so eingin inntøka undir 65.000 rindar nakað í landsskatti. Ein stórur bati fyri 1000-tals føroyingar við teimum allar lægstu inntøkunum. Hesi hava síðan flatskattin ongan bata fingið, og Fólkaflokkurin heldur, at tíðin nú er komin.

Av tí at allar lægstu inntøkurnar bert rinda kommunuskatt, er neyðugt at gera broytingar her, og bert botnfrádrátturin í kommunuskattinum kann røkka endamálinum.

Botnfrádrátturin í kommunuskattinum er 30.000 kr., og við hesum uppskoti verður heimilað kommunum at hækka botnfrádráttin. Botnfrádrátturin í kommunuskattinum kann eftir uppskotinum ásetast millum 30.000 kr. og 65.000 kr. Ynskiligt hevði verið, at kommunurnar líðandi hækkaðu botnfrádráttin upp til 65.000 kr., sum er sama støði, sum botnfrádrátturin í landsskattinum er. Hetta fyri, at tey allar lægst løntu eisini fáa ein bata.

Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar.

Uppskotið varð eisini viðgjørt í næst seinastu tingsetu, sí løgtingsmál nr. 64/2016.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Eingin beinleiðis fíggjarligur kostnaður stendst av uppskotinum. Í lógaruppskotinum fáa kommunurnar bert møguleika at hækka botnfrádráttin – botnfrádrátturin hækkar ikki sjálvvirkandi.

Men fyri at vísa á, hvat ein møguligur kostnaður verður, kann sum dømi nevnast, at um allar kommunurnar hækka botnfrádráttin við 1.000 kr., vísir ein leyslig meting, at hetta merkir uml. 8 mió. kr. í mistum inntøkum fyri kommunurnar.

**Serligar viðmerkingar**
Til § 1, nr. 1:
Í galdandi lóg er ásett "...so at tann lægra inntøkan verður hækkað við upp til kr. 30.000...". Av tí, at broyting verður framd í § 46, stk. 1 soleiðis, at heimild verður givin kommunum at hækka botnfrádráttin, verður § 4, stk. 1 umorðað soleiðis, at ein ávís upphædd ikki verður ásett. Við hesum uppskoti verður tann lægra inntøkan hækkað við upp til ásetta skattafría botnfrádráttin hjá kommununi.

Til § 1, nr. 2:
Møguleiki verður givin bý- og bygdaráðunum at hækka sokallaða botnfrádráttin í kommunuskattinum upp til 65.000 kr. Heimilað verður ikki at lækka botnfrádráttin undir 30.000 kr., men bert at hækka hann frá 30.000 kr. og upp til í mesta lagi 65.000 kr. Botnfrádrátturin kann hækka frá 1. januar 2019.
Bý- og bygda(r)ráðini skulu góðkenna broytingina í upphæddini áðrenn 1. desember árið fyri, broytingin kemur í gildi.

Til § 2:
Áseting um gildiskomu.

**Á Løgtingi, 19. september 2018**

Jørgen Niclasen